Skráset. nr. 4627
5. rokkskaparár

**'11**

# Ársfrásøgn



Betri pensjón

# PARTAFELAGSUPPLÝSINGAR

### Felagið

Betri Pensjón P/F
Kongabrúgvin
Postboks 329
FO 110 Tórshavn
Tel 345600
betri@betri.fo
www.betri.fo

Skrás. nr. 4627
Roknskaparár 5

### Nevnd

Regin Hammer, nevndarformaður
Heini Joensen
Herjolvur P. Jakobsen

### Stjórn

Mortan Poulsen, stjóri

### Grannskoðan

SPEKT
løggildir grannskoðarar Sp/f

### Ársaðalfundur

Ársaðalfundur verður hildin eftir nærri áseting.




# INNIHALDSYVIRLIT


Partafelagsupplýsingar 2

Leiðslufrágreiðing 4

Nýttur roknskaparháttur 12

5 ára yvirlit 14

Rakstrarroknskapur 15

Fíggjarstøða 16

Notur 18

Leiðsluátekning 24

Átekning frá óheftum grannskoðarum 25



# LEIÐSLUFRÁGREIÐING


- Árið 2011
- Hendingar í 2011
- Fíggjarstøða
- Kapitalstyrki
- Stýring av váða
- Vitanarstøði
- Menning
- Etiskar reglur í sambandi við íløgur
- Vónir fyri 2012
- Fíggjarútlitini fyri 2012
- Serligar hendingar
- Eigaraviðurskifti
- Leiðslustørv hjá nevnd og stjórn

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

## ÁRIÐ 2011

Betri Pensjón P/F er eitt lívs- og pensjónsfelag, ið selur pensjónsloysnir til føroyska marknaðin. Felagið vendir sær bæði til einstaklingar og feløg og hevur góðar smidligar loysnir til fakfeløg.

Árið 2011 gjørdist eitt gott ár, har tryggingargjøldini íroknað innskot vóru 124 mió. kr. ímóti 111 mió. kr. í 2010, ella ein vøkstur uppá umleið 12%. Samlaðu inntøkurnar í fíggjarætlanini fyri 2011 vóru mettar til 100 mió. kr., og mugu inntøkurnar tí metast sum nøktandi. Samlaði uppspardi peningurin hjá kundunum í Betri Pensjón P/F er nú nærum 294 mió. kr. Tá felagið bert hevur virkað á føroyska pensjónsmarknaðinum í góð 4 ár, er hetta eitt gott úrslit.

Rakstrarúrslitið hjá Betri Pensjón P/F í 2011 eftir skatt var eitt hall uppá 7,1 mió. kr. ímóti einum halli í 2010 uppá 13,1 mió. kr. Samlaði rakstrarkostnaðurin var uppá 13,5 mió. kr., ímóti 21,4 mió. kr. í 2010. Orsøkin til stóra munin í rakstrarkostnaðinum er, at felagið í 2010 niðurskrivaði KT- og stovningarútreiðslur í einum.

Tilgongdin av nýggjum kundum helt fram í 2011 og vóru við árslok 3.221 persónar skrásettir ímóti 2.603 í 2010.

Í 2011 fóru nógvar hendingar fram, ið høvdu stóra ávirkan á fíggjarmarknaðin, og komu fleiri lond í Evropa í trupulleikar. Samlað góvu partabrøvini hjá Betri Pensjón P/F vinning í 4 mánaðir og hall í 8, meðan lánsbrøvini góvu vinning í 7 mánaðir og hall í 5. Samlað góvu partabrøvini í 2011 eitt hall uppá 8,9%, meðan lánsbrøvini góvu ein vinning uppá 6,9%.

Úrslitið av íløguvirkseminum varð ein inntøka uppá 5,4 mió. kr. ímóti einum vinningi uppá 11,6 mió. kr. í 2010.

**Gongdin í íløgudeildini**




## HENDINGAR Í 2011

Tá Betri Pensjón P/F byrjaði sítt virksemi, var tað fyrstu ferð at pensjón varð selt sum ein rein marknaðarrentu vøra. Tað er eingin ivi um, at tað er henda vegin at føroyski marknaðurin fer at flyta seg. Nevnast kann, at í Danmark í 2010 vóru tey tryggingargjøld, ið fara til marknaðarrentu størri enn tey, ið fara til vanligar pensjónir til fasta rentu. Av nýggjum kundum valdu heili 85% marknaðarrentu. Henda gongdin helt fram í 2011.

Tá nýggja landsstýrið tók við í 2011 kom fram, at arbeitt hevur verið við at skatta pensjónir við inngjaldi heldur enn við útgjaldi.

Ført hevur verið fram, at hetta ongan týdning hevur fyri tey, ið spara upp til pensjón, um skatturin við inngjaldi er júst tann sami, sum við útgjaldi.

Eftirlønaravtalur eru langtíðaravtalur millum einstaklingar og politisku skipanina í landinum. Skal álitið ikki máast burtur undan hesum avtalum, er neyðugt við støðugum kørmum, sum gera, at fólk kenna seg trygg og kunnu taka avgerðir í mun til givnar fortreytir.

Tað ber ikki til at broyta fortreytirnar so grundleggjandi uttan gjølla og væl grundaða fyrireiking.

Lógin um skatt av pensjónum varð samtykt stutt fyri jól. Hetta gav stutt skotbrá at fyrireika skipanir og mannagongdir.

Nú pensjónsnýskipanin skal fyri tingið, er at vóna, at ein breiður politiskur meiriluti kemur at standa aftan fyri, og feløgini á føroyska pensjónsmarknaðinum fáa góða tíð at fyrireika seg.

Síðani Føroya Lívstrygging P/F bleiv alment partafelag í 2000, hevur verið arbeitt við at einskilja felagið. Nýggj roynd var gjørd í 2011, har bjóðað var at keypa 50% av felagnum, meðan ognarfelagið hjá tryggingartakarunum komu at eiga hini 50%. 3 feløg vístu áhuga. At enda var tað tó bert BankNordik P/F og TF Holding P/F, ið góvu endaligt boð inn. Úrslitið gjørdist, at BankNordik P/F keypti 50% av Føroya Lívstrygging P/F við yvirtøku tann 1. januar 2012. Síðani er tó tað hent, at samráðingarnar millum BankNordik P/F og Ognarfelagið LÍV eru slitnaðar. Føroya Lívstrygging P/F er sostatt framvegis ogn hjá landinum.

Í 2011 gjørdist Eik Banki P/F ein partur av samtakinum og var beinanvegin farið undir at samskipa pensjóns- og tryggingarøkini hjá Eik Banki P/F og Betri Pensjón P/F. Á heysti var stór marknaðarherferð, har lýsingar vóru at síggja við bæði Eik Banki P/F, Tryggingarfelagið Føroyar P/F og Betri Pensjón P/F sum lýsara.

## FÍGGJARSTØÐA

Fíggjarstøðan hjá Betri Pensjón P/F vaks úr 228,2 mió. kr. til 339,9 mió. kr. í 2011.

Avsetingarnar fyri Unit Link sáttmálar vuksu úr 177,7 mió. kr. til 293,5 mió. kr.

Eginognin var við árslok 2011 31,6 mió. kr. móti 38,7 mió. kr. í 2010.

**Nevndin mælir til, at ársúrslitið verður greinað soleiðis:**

tkr.

| | |
|---|---|
| **Flutt úrslit undanfarin ár** | **-36.288** |
| **Flutt úrslit í árinum** | **-7.082** |
| **Uppskot til vinningsbýti** | **0** |
| **Fluttur vinningur við árslok** | **-43.370** |

## KAPITALSTYRKI

Yvirlitið niðanfyri vísir kapitalstyrkina í mun til tryggingarskyldurnar:

| KR. 1.000 | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Eginogn | 31.630 | 38.711 |
| Immatriel ogn | 3.433 | 3.540 |
| Skattaáogn | 547 | 3 |
| Grundarfæfeingi | 27.650 | 35.168 |
| Fæfeingiskrav | 24.000 | 24.000 |
| Kapitalstyrki | 3.650 | 11.168 |

Mett verður, at felagið hevur neyðugu fíggjarligu styrkina við atliti til lógarkrøvini, ið eru galdandi. Í rakstrarætlanini fyri 2012 verður roknað við einum minni halli, tí at tilgongdin av nýggjum kundum er økt uppí nærum 6.000 kundar. Viðmerkjast skal tó, at munurin millum grundarfæfeingið og fæfeingiskravið ikki er meira enn góðar 3,7 mió. kr.

Fyri at styrkja felagið hevur Betri Pensjón P/F fingið tilsøgn frá TF Holding P/F um kapitalhækkan á 10 mió. kr. Hendan kapitalhækkanin verður samtykt á komandi aðalfundi felagsins.

## STÝRING AV VÁÐA

Betri Pensjón P/F metir váða at fevna um øll viðurskifti, ið kunnu hava neiliga ávirkan á møguleikar felagsins at røkka síni handilsligu mál. Betri Pensjón P/F nýtir væl skipaðar mannagongdir til at stýra váðanum. Eisini hevur nevndin ásett umfatandi yvirskipaðar leiðreglur, sum stjórnin og leiðslan annars alsamt halda eyga við verða hildnar.

| Fíggjarligir váðar | Tryggingarligir váðar | Operationellir váðar |
|---|---|---|
| Marknaðarváði | Livitið | KT-váðar |
| Gjaldførisváði | Deyðstíttleiki | Løgfrøðiligir váðar |
| Mótpartsváði | Avlamnistíttleiki | Umsitingarligir váðar |
| Spjaðingarváði | Spjaðing | Svik |
| | | Umdømi |
| | | Strategi |

## FÍGGJARLIGIR VÁÐAR

**Marknaðarváðin** er váðin fyri, at dagsvirðið á ognum felagsins broytast orsakað av broyttum marknaðarviðurskiftum so sum rentu, kursi v.m. Fyri Betri Pensjón P/F er marknaðarváðin nógv tann størsti fíggjarligi váðin. Hesin váði verður avmarkaður við at tryggja hóskandi karmar fyri rentuváða fyri lánsbrøv, saman við eini varisligari íløguætlan fyri partabrøv.

Eisini verður marknaðarváðin avmarkaður við, at felagið grundar sítt virksemi á Unit Link tryggingar, har kundarnir bera allan íløguváðan. Marknaðarváðin er undir neyvum eftirliti.

**Gjaldførisváðin** er váðin fyri at staðfesta tap, tí neyðugt er við stuttum skotbrái at útvega gjaldføri fyri at rinda sínar skyldur. Váðin verður avmarkaður við at hava munandi partar av íløgunum í tøkum peningi og í virðisbrøvum, sum eru skrásett í keypsskálum.

**Mótpartsváðin** er váðin fyri tapi, tí mótpartar ikki halda sínar skyldur. Mótpartsváðin verður m.a. avmarkaður við at samstarva við íløguumsitarar, sum hava drúgvar royndir og gott orð á sær.

Vantandi spjaðing í íløgum kann hava við sær tap. Spjaðingarváðin verður avmarkaður við at spjaða íløgur felagsins í ymsar vinnur og marknaðir, og við at avmarka íløgur í einstakar ognir (sama útskrivara). Íløgurnar í partabrøv eru spjaddar við atliti til vinnugrein og lond. Somuleiðis fevnir spjaðingarváðin um vanda fyri, at kundar felagsins kunnu missa munandi partar av síni samansparing orsakað av ov lítlari spjaðing í íløgunum. Felagið hevur, kundans vegna, avmarkað henda váðan fyri flestu vørur-

# LEIÐSLUFRÁGREIÐING

Framhald frá síðu 7

nar við at broyta samansetingina av íløgum, so hvørt sum kundin nærkast eftirlønaraldri.

## TRYGGINGARLIGIR VÁÐAR

Teir tryggingarligu váðanir eru knýttir at gongdini í deyðstíttleika, avlamistíttleika v.m. Hækkandi livialdur økir veitingar felagsins til eftirlønir, meðan talið av andlátum og sjúkrameldingum ávirkar veitingar í sambandi við deyða og sjúku. Av tí at felagið í høvuðsheitum hevur lagt seg eftir Unit Link tryggingum, har eftirlønin hjá kundanum er knýtt at teirri íløgustrategi, kundin sjálvur hevur valt, eru tryggingarligu váðarnir avmarkaðir.

Spjaðingarváði í sambandi við tryggingarligar váðar fevnir um vandan fyri tapi, tá stór samvinna er við einstakar kundabólkar og einstakar persónar. Felagið avmarkar tryggingarligu váðarnar við spjaðing av tryggingarmongdini millum ymiskar kundabólkar, við hámørkum fyri ymsum tryggingardekningum og við endurtrygging.

## OPERATIONELLIR VÁÐAR

Felagið kann koma út fyri fíggjarligum tapum vegna operationellan váða, ella hesin kann skaða umdømi felagsins. Operationellir váðar fevna um váða fyri tapi vegna feilir í KT-skipanum, løgfrøðiligum ósemjum, ikki nøktandi ella skeivum mannagongdum ella sviki. Felagið avmarkar operationellan váða við innaneftirliti og funktiónsskilnaði. Hetta verður alsamt endurskoðað og dagført. Harumframt fylgir felagið neyvt við gongdini á marknaðinum fyri at tryggja, at prísir og tænastustøði eru kappingarfør. Stórur dentur verður lagdur á góða kundatænastu umframt opinleika og gjøgnumskygni í samskiftinum við kundan.

## VITANARSTØÐI

Fyri Betri Pensjón P/F er tað av alstórum týdningi, at starvsfólk hava høgt vitanarstøði. Øllum starvsfólkum verður tryggjað viðkomandi útbúgving og eftirútbúgving fyri at økja førleikarnar, so felagsins kundum verður veitt hollasta ráðgeving.

## MENNING

Betri Pensjón P/F leggur stóran dent á at betra um kappingarføri við øðrvísi tryggingarvørum, og tað verður støðugt arbeitt við menning á hesum øki.

## ETISKAR REGLUR Í SAMBANDI VIÐ ÍLØGUR

Betri Pensjón P/F setur stór krøv til, hvussu tann samanspardi peningurin verður umsitin, og hvørji etisk krøv verða sett til íløgurnar. Dagført yvirlit yvir, hvørjar fyritøkur eru fevndar av íløguprógvum felagsins, er til skjals á www.sparinvest.dk og www.sparindex.dk.

Í 2012 verður gjørt uppaftur meira fyri at tryggja, at íløgurnar eru í samsvari við tær etisku meginreglur, sum eru galdandi, og strembað verður eftir at liva upp til standardkrøvini hjá ST (Sameindum Tjóða), feld niður í sonevndu UN PRI avtaluna.

## VÓNIR FYRI 2012

Nógvar broytingar eru farnar fram og fara fram í næstum. Løgtingið samtykti beint fyri jól eina stóra broyting í rentutryggingarlógini, ið førir við sær, at øll pensjónsgjøld verða skattað við inngjaldi. Hetta fekk nógva umrøðu í fjølmiðlum og millum manna, og ilt er at meta um, hvørja ávirkan hetta fer at fáa fyri gongdina á pensjónsmarknaðinum.

At skatta pensjónir er eitt politiskt val. Vit hava tó gjørt vart við, at tað var óheppið, at tað ikki vóru betri stundir til at fyrireika broytingina, og at tað ikki var eitt samt løgting, ið samtykti broytingarnar.

Næsta stóra broyting á pensjónsmarknaðinum er pensjónsnýskipanin, ið ætlandi skal koma í gildi í 2013. Vit fara at mæla til, at hetta stórmál verður væl fyrireikað, og at tað verður ein so breiður politiskur meiriluti fyri nýskipanini sum til ber.

Mett verður, at raksturin hjá Betri Pensjón P/F verður munandi betri í 2012. Samstarvið við Eik Banki P/F kemur at merkja eina stóra framgongd í kundatalinum og økja inntøkurnar munandi. Tað verður tó mett, at raksturin í 2012 fer at geva eitt lítið hall.

## FÍGGJARÚTLITINI FYRI 2012

Avgerandi fyri gongdina í virðisbrøvunum í 2012 verður, um politikarar vísa dirvi, veruliga nýskipa og velja tær røttu politisku loysnirnar, sum muna og soleiðis loysa ógvusligu skuldarkreppuna.

Evropeiski miðbankin hevur í seinastuni víst vilja til at gera mun, samstundis sum evropeisku londini eru farin at samarbeiða um at loysa kreppuna. Hesi viðurskifti benda á, at ein endalig loysn er í eygsjón, hóast tað kann taka drúgva tíð.

Virðisbrævamarknaðirnir ávirkast, tá ein loysn kann væntast og ikki, tá ið trupulleikin er loystur. Tískil er helst orsøk til bjartskygni í 2012.

Í meira stutta skotbránum er avgerandi fyri virðisbrøvini, um ein verulig kreppa millum Iran og USA tekur seg upp. Hendir hetta, vil tað fáa álvarslig árin á oljuprísin og tí eisini á búskaparvøksturin, sum annars verður spáddur at verða nøktandi.

Mett verður, at fíggjarinntøkurnar fyri partabrøv fara at verða góðar í 2012, meðan vanlig lánsbrøv koma at verða ávirkaði av rentuni, ið mest sannlíkt fer at halda sama lága støði í 2012.

## SERLIGAR HENDINGAR

Fyri at styrkja felagið hevur Betri Pensjón P/F fingið tilsøgn frá TF Holding P/F um kapitalhækkan á 10 mió. kr. Hendan kapitalhækkanin verður samtykt á komandi aðalfundi felagsins.

Frá degnum fyri fíggjarstøðuna til í dag eru ongar aðrar týðandi hendingar farnar fram, sum ávirka metingina av ársfrásøgnini.

## EIGARAVIÐURSKIFTI

TF Holding P/F er móðurfelag hjá Betri Pensjón P/F og eigur allan partapeningin í felagnum.

## LEIÐSLUSTØRV HJÁ NEVND OG STJÓRN

Upplýsingar um onnur leiðslustørv hjá nevnd og stjórn:

**Nevndarformaður: Regin Hammer**
Forstjóri í:
- TF Holding P/F og Tryggingarfelagnum Føroyar P/F.

Nevndarformaður í:
- TF Ognir P/F
- TF Íløgur P/F
- Faroe Insurance Company Guernsey Ltd.

**Nevndarlimur: Heini Joensen**
Nevndarlimur í:
- TF Ognir P/F
- TF Íløgur P/F
- Faroe Insurance Company Guernsey Ltd.
- H. N. Jacobsen's Bókahandil P/F





Nýttur roknskaparháttur
5 ára yvirlit
Rakstrarroknskapur 1. januar – 31. desember
Fíggjarstøða 31. desember
Notur til ársfrásøgnina
Leiðsluátekning
Átekning frá óheftum grannskoðarum

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

## ALMENT

Ársfrásøgnin er gjørd sambært Løgtingslóg um tryggingarvirksemi og tilhoyrandi kunngerð nr. 2 frá 30. desember 2009 um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum (hereftir kunngerð nr. 2).

Flokkingin av tíðaravmarkingum undir skuld er broytt í mun til undanfarin ár, og samanberingartøl er tilpassað broytingina. Annars er nýttur roknskaparháttur óbroyttur í mun til ársfrásøgnina fyri 2010.

### Avrunding av upphæddum

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundað til heil tøl uttan desimalir. Av tí at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og samløguna av einstøku upphæddunum.

### Um innroknan og virðisáseting í ársfrásøgnini

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið fær framtíðar fíggjarligar ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og støddin á skyldunum kunnu gerast upp álítandi.

Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar, harundir virðisjavningar av fíggjarligari ogn og skuld. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis innroknaðar allar útreiðslur – harundir tryggingarveitingar og broyting í avsetingum – sum eru við til at røkka ársins inntøku.

### Konsernviðurskifti og nærstandandi partar

Handil og tænastur millum feløg í samtakinum verða avgreiddar til marknaðarprís ella á útreiðslunøktandi støði.

### Roknskaparligar metingar

Roknskaparliga virði av ávísum ognum og skyldum er tengt at metingum av, hvussu hesar ognir og skyldur verða ávirkaðar av framtíðar hendingum.

### Umrokning av útlendskum gjaldoyra og kurstryggjan

Ársfrásøgnin er í donskum krónum. Upphæddir í útlendskum gjaldoyra verða umroknaðar til danskar krónur við gjaldoyrakursinum flytingardagin.

Áogn, skuld og annað í útlendskum gjaldoyra verður umroknað til danskar krónur við gjaldoyrakursinum á degnum fyri fíggjarstøðuni. Staðfestur og ikki staðfestur vinningur ella tap av umrokning av útlendskum gjaldoyra verður innroknað í rakstrarroknskapin undir íløguvirksemi.

### Rakstrarúrslit

Felagið hevur býtt rakstrarúrslitið fyri 2011 eftir kontributiónsmeginregluni, sum í stuttum merkir, at tey, ið eru við til at skapa úrslitið, fáa sín lut í hesum.

## RAKSTRARROKNSKAPURIN

### Tryggingargjøld fyri egna rokning

Upphæddin fevnir um brutto tryggingarinntøkur, javnað fyri latin endurtryggingargjøld.

### Úrslit av íløguvirksemi

Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. fevna um ársins rentuinntøkur av innlánum, virðisbrøvum og vinningsbýti av partabrøvum. Virðisjavningar fevna um ársins virðisjavningar av virðisbrøvum.

Tann partur av fyrisitingarkostnaði felagsins, sum hevur beinleiðis tilknýti til íløguvirksemi, verður innroknaður sum fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi.

### Tryggingarveitingar

Goldnar veitingar í árinum, umframt broyting í avsetingum til endurgjøld frádrigið endurtryggjarans part, verða innroknaðar sum tryggingarveitingar. Upphæddin fevnir eisini um afturkeyp av tryggingargjøldum og afturberingar av tryggingargjøldum.

### Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi

Tann parturin av rakstrarkostnaðinum, ið beinleiðis ella óbeinleiðis kann knýtast at fasthaldan av verandi tryggingum og/ella at nýtekningum, er vístur undir nýtekningarútreiðslum.

Fyrisitingarkostnaður fevnir um útreiðslur, sum eru nýttar í sambandi við umsiting av verandi tryggingum og av tíðargreinaðum útreiðslum, ið viðvíkja roknskaparárinum.

### Flutt úrslit av íløguvirksemi

Fevnir um tann partin av úrslitinum av íløguvirksemi, sum viðvíkur eginognini. Tað eru ikki ávísar íløguognir knýttar at eginognini, og tí verður parturin hjá eginognini roknaður út sum ein lutfalsligur partur av samlaða úrslitinum.

### Skattur

Skattur av ársúrslitinum er roknaður skattur við 18% við støði í úrsliti áðrenn skatt, tillagað fyri ikki skattskyldugar inntøkur og útreiðslur. Útreiðsluførdi skatturin fevnir um aktuellan skatt av skattskylduga ársúrslitinum og javning av útsettum skatti.

Avsetingin til útsettan skatt verður roknað við 18% av teimum tíðarbundnu frávikunum, sum stava frá, at inntøkur og útreiðslur ikki verða tiknar við í rakstrarroknskapinum og skattskyldugu inntøkuna í sama tíðarskeiði.

Útsett skattaáogn, herímillum skattliga virðið á framflytingarheimilaðum skattligum halli, verður innroknað við tí virði, sum ognin væntandi verður realiserað fyri.

Felagið er samskattað við móðurfelagið TF Holding P/F. Í tann mun skattlig hall verða nýtt av øðrum feløgum í samskattingini, verður skattavirðið av hallinum goldið tí felagnum, sum letur hallið frá sær.

## FÍGGJARSTØÐAN

### Immateriell ogn

Immateriell støðisogn verður upptikin til útveganarvirði við frádrátti av samlaðum avskrivingum.
Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er roknað út frá væntaðu nýtslutíðini, tó í mesta lagi í 20 ár.

**Avskrivingartíðarskeiðini eru:**
*Ritbúnaður 5-7 ár*

Immateriell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

### Materiell støðisogn

Materiell støðisogn verður innroknað til útveganarprís við frádrátti av samlaðum avskrivingum.
Avskrivingin er eins stór fyri tey einstøku roknskaparárini og er roknað út frá væntaðu nýtslutíðini og mettum restvirði.

Kostprísur er útveganarprísur, umframt kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at útveganini til dagin, tá ið ognin er klár at taka í nýtslu.

**Avskrivingartíðarskeiðini eru:**
*Innbúgv 3-7 ár*
*KT-búnaður 3-7 ár*

Materiell støðisogn verður niðurskrivað til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið. Fyri hvørja ogn sær verður árliga mett um tørvur er á niðurskriving.

### Íløguognir

Virðisbrøv verða innroknað í fíggjarstøðuna til keypsprís við frádrátti av keypskostnaði og verða eftir fyrstu innrokning virðissett til dagsvirði. Handlað virðisbrøv verða tikin við/úr fíggjarstøðuni á avrokningardegnum. Dagsvirði av børsskrásettum virðisbrøvum verður gjørt upp við støði í børsskrásetta endakursinum við árslok.

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiseraðan kostprís, har hædd verður tikin fyri væntaðum tapum.

### Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur

Avsetingar til Unit Link avtalur fevnir um goldin inngjøld við ískoyti av virðisjavningum og við frádrátti av útgjøldum og fyrisitingarkostnaði.

Avsetingar til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum umfatar skyldur til at veita bonus og avsláttur av inngoldnum tryggingargjøldum v.m.

Avsetingar til endurgjøld umfata fráboðaðar, men ikki útgoldnar tryggingarveitingar. Upphæddini fevnir harumframt um eina meting av tryggingarveitingum, sum stava frá tryggingarhendingum í roknskaparárinum, men sum ikki eru fráboðaðar við árslok.

### Skuld

Skuld verður virðissett til amortiseraðan kostprís, og svarar hetta vanliga eisini til áljóðandi virði.

### Útsettur skattur

Útsettur skattur verður roknaður av øllum viðkomandi tíðarbundnum munum millum roknskaparlig og skattlig virðir av aktivum og skyldum.

Útsettur skattur verður innroknaður við støði í teimum skattareglum og skattasatsum, sum eru galdandi uppgerðardagin. Útsett skattaogn, harundir skattavirðið av framfluttum skattligum hallum, verða innroknað til tað virði, ognin kann væntast at kunna realiserast fyri.

### Aktuellur skattur

Skyldugur skattur verður innroknaður í fíggjarstøðuna við upphæddini, sum kann útroknast av skattskyldugu inntøkuni fyri árið, javnað fyri skatti viðvíkjandi undanfarnum árum.

### Lyklatøl

Hesi eru útroknað sambært ásetingum í kunngerð nr. 2.

# 5 ÁRA YVIRLIT

| HØVUÐSTØL (KR. 1.000) | 2011 | 2010 | 2009 | 2008 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| **RAKSTUR** | | | | | |
| Tryggingargjøld | 124.007 | 110.459 | 41.954 | 24.984 | 626 |
| Útgoldnar veitingar | -8.774 | -6.815 | -754 | -174 | 0 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 5.388 | 11.563 | 9.779 | -7.715 | -116 |
| Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi | -13.477 | -21.406 | -13.581 | -11.390 | 3.614 |
| Úrslit av endurtrygging | -328 | -219 | -180 | -368 | 0 |
| Tryggingartekniskt úrslit | -9.277 | -16.397 | -12.601 | -11.002 | -3.530 |
| Úrslit eftir skatt | -7.082 | -13.091 | -7.182 | -12.759 | 3.256 |
| **FÍGGJARSTØÐA** | | | | | |
| Avsetingar til tryggingar- og íløguavtalur í alt | 304.542 | 183.292 | 68.344 | 21.966 | 528 |
| Eginogn í alt | 31.630 | 38.711 | 31.802 | 23.984 | 36.743 |
| Ognir í alt | 339.885 | 228.226 | 108.624 | 65.053 | 57.654 |
| **LYKLATØL** | | | | | |
| **Lyklatøl fyri kostnaðir og váðar** | | | | | |
| Kostnaðir í % av tryggingargjøldum | 10,9% | 19,4% | 32,4% | 45,6% | -577,3% |
| Kostnaðir í % av avsetingum | 5,7% | 17,4% | 30,2% | 101,3% | 684,5% |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 3.775 Kr. | 11.401 Kr. | 33.700 Kr. | 72.479 Kr. | 66.312 Kr. |
| Kostnaðarúrslit | -4,9% | -16,4% | -29,4% | -100,0% | -1365,9% |
| Váðaúrslit | -1,2% | -2,9% | -3,7% | -5,0% | -28,8% |
| **Lyklatøl fyri konsolidering** | | | | | |
| Ognarkapitalstig | 10,4% | 21,1% | 46,5% | 109,2% | 6958,9% |
| Yvirfulnaðarstig | 32,9% | 198,7% | 1008,9% | - | - |
| Solvensdekningur | 115,2% | 146,5% | 118,4% | 80,7% | 128,8% |
| **Lyklatøl fyri renting** | | | | | |
| Renting av eginogn áðrenn skatt | -24,6% | -63,2% | -42,1% | -51,2% | -21,6% |
| Renting av eginogn eftir skatt | -20,1% | -51,8% | -34,5% | -42,0% | -17,7% |



# RAKSTRARROKNSKAPUR 1. JANUAR - 31. DESEMBER

Kr. 1.000

| NOTA | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| | **TRYGGINGARGJØLD FYRI EGNA ROKNING** | | |
| 1 | Bruttotryggingarinntøkur | 124.335 | 110.678 |
| | Endurtryggingargjøld | -328 | -219 |
| | **Tryggingargjøld fyri egna rokning í alt** | **124.007** | **110.459** |
| | **ÍLØGUVIRKSEMI** | | |
| 2 | Rentuinntøkur og vinningsbýti | 6.827 | 2.292 |
| 3 | Virðisjavningar | -1.480 | 9.492 |
| | Rentuútreiðslur | -181 | -144 |
| | Fyrisitingarkostnaður í samband við íløguvirksemi | 222 | -77 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **5.388** | **11.563** |
| | **TRYGGINGARVEITINGAR** | | |
| 4 | Útgoldnar veitingar | -8.027 | -6.103 |
| | Broyting í endurgjaldsavsetingum | -748 | -712 |
| | **Tryggingarveitingar fyri egna rokning í alt** | **-8.774** | **-6.815** |
| | **Broyting í avseting til Unit Link sáttmálar** | **-115.780** | **-109.766** |
| | **RAKSTRARKOSTNAÐUR AV TRYGGINGARVIRKSEMI** | | |
| 5 | Nýtekningarkostnaður | -9.051 | -10.181 |
| 5 | Fyristingarkostnaður | -4.426 | -11.225 |
| | **Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning í alt** | **-13.477** | **-21.406** |
| | **Flutt úrslit av íløguvirksemi** | **-641** | **-432** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit** | **-9.277** | **-16.397** |
| | **Íløguúrslit av eginognini** | **641** | **432** |
| | **ÚRSLIT ÁÐRENN SKATT** | **-8.636** | **-15.965** |
| 6 | **Skattur** | **1.554** | **2.874** |
| | **ÁRSÚRSLIT** | **-7.082** | **-13.091** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

Kr. 1.000

| NOTA | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| 7 | **Immateriel ogn** | **3.433** | **3.540** |
| | **Materiel ogn** | | |
| | Rakstrargøgn | 0 | 6 |
| 8 | **Materiel ogn í alt** | **0** | **6** |
| | **Aðrar fíggjarligar íløguognir** | | |
| | Íløguprógv | 24.721 | 19.522 |
| | Innlán í kreditfeløgum | 16.358 | 26.787 |
| | **Aðrar fíggjarligar íløgur í alt** | **41.079** | **46.309** |
| 9 | **Íløguognir í alt** | **41.079** | **46.309** |
| 10 | **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum** | **293.451** | **177.672** |
| | Áogn hjá tilknýttum fyritøkum | 931 | 0 |
| | **Áogn í alt** | **931** | **0** |
| | **Aðrar ognir** | | |
| 6 | Útsett skattaáogn | 547 | 3 |
| | **Aðrar ognir í alt** | **547** | **3** |
| | **Tíðaravmarkingar** | | |
| | Aðrar tíðaravmarkingar | 443 | 697 |
| | **Tíðaravmarkingar í alt** | **443** | **697** |
| | **OGN Í ALT** | **339.885** | **228.226** |

## FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

Kr. 1.000

| NOTA | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| | **SKULD** | | |
| | **Eginogn** | | |
| | Partapeningur | 47.500 | 47.500 |
| | Yvirkursur við partabrævaútgávu | 27.500 | 27.500 |
| | Flutt úrslit | -43.370 | -36.289 |
| 11 | **Eginogn í alt** | **31.630** | **38.711** |
| | **Avsetingar til tryggingar- og íløgusáttmálar** | | |
| | Endurgjaldsavsetingar | 1.898 | 1.150 |
| | Avsett til bonus og avsláttur av tryggingargjøldum | 9.194 | 4.471 |
| | Avsetingar til Unit Link sáttmálar | 293.451 | 177.672 |
| 12 | **Tryggingartekniskar avsetingar í alt** | **304.542** | **183.292** |
| | **Skuld** | | |
| | Skuld í sambandi við trygging | 894 | 1.158 |
| | Skuld til tilknýttar fyritøkur | 787 | 1.763 |
| | Annað | 2.231 | 3.301 |
| | **Skuld í alt** | **3.713** | **6.223** |
| | **SKULD Í ALT** | **339.885** | **228.226** |

13 Eventualskyldur og trygdarveitingar
14 Nærstandandi partar
15 Viðkvæmisgreining av fíggjarognum
16 Býti av samlaðum íløguognum á virkisøki og stað

# NOTUR

Kr. 1.000

| NOTA | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| 1 | **Bruttotryggingarinntøkur** | | |
| | Leypandi inngjøld | 53.668 | 43.795 |
| | Eingangsinngjøld | 63.764 | 59.013 |
| | Inntøkur frá samlagstryggingum | 6.902 | 7.870 |
| | | **124.335** | **110.678** |
| | **Herav inngjøld** | | |
| | úr Føroyum | 124.335 | 110.678 |
| | úr EU-londum | 0 | 0 |
| | úr øðrum londum | 0 | 0 |
| | | **124.335** | **110.678** |
| | **Tal av tryggjaðum** | | |
| | Individuelt teknaðar tryggingar | 893 | 693 |
| | Tryggingar teknaðar í samband við starvsetan | 2.769 | 2.286 |
| | Samlagstryggingar | 2.691 | 2.300 |
| 2 | **Rentuinntøkur og vinningsbýti** | | |
| | Renta av virðisbrøvum, innlánum og útlánum | 141 | 101 |
| | Vinningsbýti frá kapitalpørtum | 6.687 | 2.191 |
| | | **6.827** | **2.292** |
| 3 | **Virðisjavningar** | | |
| | Partabrøv | -7.898 | 8.979 |
| | Lánsbrøv | 6.418 | 513 |
| | | **-1.480** | **9.492** |
| 4 | **Útgoldnar veitingar** | | |
| | Tryggingargjøld við deyða | -1.670 | -599 |
| | Afturkeyp | -1.634 | -1.034 |
| | Bonus | -4.723 | -4.471 |
| | | **-8.027** | **-6.103** |
| 5 | **Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður** | | |
| | **Starvsfólkakostnaður** | | |
| | Lønir | -4.119 | -3.550 |
| | Eftirlønir | -564 | -494 |
| | Aðrir kostnaðir til almannatrygd | -134 | -120 |
| | Lønarhæddaravgjald | -396 | -330 |
| | Aðrir starvsfólkakostnaðir | -104 | -75 |
| | | **-5.317** | **-4.570** |
| | **Herav løn og samsýning til nevnd og stjórn** | | |
| | Nevndarsamsýning | -159 | -135 |
| | Stjórn | -1.101 | -1.035 |
| | **Fulltíðarstørv** | **8** | **7** |

Kr. 1.000

| NOTA | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| 5 | **Nýtekningar- og fyrisitingarkostnaður, framhald** | | |
| | **Samsýning til grannskoðarar** | | |
| | **SPEKT løggildir grannskoðarar Sp/f** | | |
| | Grannskoðan | -225 | 0 |
| | Aðrar tænastuveitingar | 0 | 0 |
| | **NOTA, løggilt grannskoðanarvirkið P/F** | | |
| | Grannskoðan | 0 | -173 |
| | Aðrar tænastuveitingar | -44 | -61 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar í alt** | **-269** | **-234** |
| 6 | **Skattur** | | |
| | Úrslit áðrenn skatt | -8.636 | -15.965 |
| | **Skattur 18%** | **1.554** | **2.874** |
| | Skattur í samskatting | 1.010 | 933 |
| | Broyting í útsettum skatti | 545 | 1.940 |
| | **Skattur sambært ársfrásøgn** | **1.554** | **2.874** |
| | Verandi munir | 0 | 0 |
| | **Avstemma skattaupphædd** | **1.554** | **2.874** |
| | **Skattaáogn** | | |
| | Immateriel ogn | -618 | -637 |
| | Rakstrargøgn | 3 | 640 |
| | Frramflutt hall | **1.163** | **0** |
| | **Útsett skattaáogn í alt** | **547** | **3** |
| 7 | **Immateriel ogn** | | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 19.910 | 16.369 |
| | Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| | Tilgongd í árinum | 465 | 3.540 |
| | **Útveganarvirði 31. desember** | **20.375** | **19.910** |
| | Avskrivingar 1. januar | -16.369 | -6.023 |
| | Avskrivingar uppá seldar ognarlutir | 0 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum | -572 | -2.690 |
| | Niðurskrivingar í árinum | 0 | -7.657 |
| | **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-16.942** | **-16.369** |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **3.433** | **3.540** |
| | **Roknskaparligt virði við ársbyrjan** | **3.540** | **10.347** |
| | **Verður avskrivað yvir** | **5 - 7 ár** | |
| 8 | **Materiel ogn** | | |
| | Útveganarvirði 1. januar | 1.756 | 1.756 |
| | Frágongd í árinum | 0 | 0 |
| | Tilgongd í árinum | 0 | 0 |
| | **Útveganarvirði 31. desember** | **1.756** | **1.756** |
| | Avskrivingar 1. januar | -1.750 | -1.308 |
| | Avskrivingar uppá seldar ognarlutir | 0 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum | -6 | -442 |
| | Niðurskrivingar í árinum | 0 | 0 |
| | **Av- og niðurskrivingar 31. desember** | **-1.756** | **-1.750** |
| | **Roknskaparligt virði 31. desember** | **0** | **6** |
| | **Roknskaparligt virði 1. januar** | **6** | **448** |
| | **Verður avskrivað yvir** | **3-7 ár** | |

Kr. 1.000

| NOTA | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|

9 **Útgreinan av íløguognum**

| | Roknskaparligt virði | |
|---|---|---|
| | Ársbyrjan | Árslok |
| Íløguprógv í útlendskum partabrøvum | 4.504 | 11.603 |
| **Íløguprógv í øðrum kapitalpøtum í alt** | **4.504** | **11.603** |
| Íløguprógv í statslánsbrøv | 3.034 | 2.881 |
| Íløguprógv í realkreditlánsbrøv | 11.984 | 10.537 |
| **Íløguprógv í lánsbrøvum í alt** | **15.018** | **13.418** |

| | Netto-íløga | Avkast í % áðrenn skatt |
|---|---|---|
| Íløguprógv í útlendskum partabrøvum | 5.041 | -8,9% |
| **Íløguprógv í øðrum kapitalpøtum í alt** | 5.041 | **-8,9%** |
| Íløguprógv í statslánsbrøv | 1,.170 | 2,1% |
| Íløguprógv í realkreditlánsbrøv | 4.279 | 4,8% |
| **Íløguprógv í lánsbrøvum í alt** | **5.449** | **6,9%** |

10 **Íløguognir knýttar at Unit Link sáttmálum**

| **Býti av íløguognum uttan trygd** | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Partabrøv | 98.446 | 68.113 |
| Lánsbrøv | 195.006 | 109.559 |
| **Íløguognir tilknýttar Unit Link sáttmálum í alt** | **293.451** | **177.672** |

11 **Eginogn**

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| **Partapeningur** | | |
| Partapeningur við ársbyrjan | 47.500 | 37.500 |
| Hækking í árinum | 0 | 10.000 |
| | **47.500** | **47.500** |
| **Yvirkursgrunnur** | | |
| Yvirkursgrunnur við ársbyrjan | 27.500 | 17.500 |
| Hækking í árinum | 0 | 10.000 |
| | **27.500** | **27.500** |
| **Flutt úrslit** | | |
| Flutt úrslit við ársbyrjan | -36.289 | -23.198 |
| Flutt frá ársúrslitinum | -7.082 | -13.091 |
| Uppskot til vinningsbýti | 0 | 0 |
| | **-43.370** | **-36.289** |
| **Eginogn 31. desember** | **31.630** | **38.712** |



Kr. 1.000

| NOTA | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|

11 **Eginogn, framhald**

**Partapeningur**

Partapeningurin hjá felagnum: Eitt partabræv á 47.500 tkr., ið TF Holding P/F eigur.

| **Grundarfæfeingið og fæfeingiskrav** | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Eginpeningur | 31.630 | 38.712 |
| Immateriel ogn | -3.433 | -3.540 |
| Uppskot til vinningsbýti | 0 | 0 |
| Útsett skattaáogn | -547 | -3 |
| **Grundarfæfeingið** | **27.650** | **35.168** |
| **Fæfeingiskrav** | **24.000** | **24.000** |

12 **Tryggingartekniskar avsetingar***

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Avseting við ársbyrjan | 183.292 | 68.344 |
| Bruttotryggingarinntøkur | 124.335 | 110.678 |
| Tryggingarveitingar | -3.304 | -1.633 |
| Rentur v.m. | 5.047 | 10.927 |
| Tryggingargjøld | 0 | 0 |
| Umsitingargjald | -1.923 | -1.328 |
| Váðaúrslit | -2.906 | -3.696 |
| **Tryggingartekniskar avsetingar við árslok** | **304.542** | **183.292** |

*Notan er broytt í mun til undanfarin ár, samanberingartøl eru tillagað broytingina.

13 **Eventualskyldur og trygdarveitingar**

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Sum trygd fyri tryggingartekniskum avsetingum eru skrásettar ognir uppá | **334.473** | **310.380** |

Felagið hevur gjørt leigusáttmála við systurfelag í samtakinum, og fevnir sáttmálin um tíðarskeiðið 1. januar 2012 - 31. desember 2017.

Felagið er samskattað við onnur feløg í samtakinum. Samskattaðu feløgini bera tí samábyrgd fyri samlaðu skattaskyldunum.

14 **Nærstandandi partar**

Nevndu feløg hava týðandi ávirkan á Betri Pensjón P/F

| **Navn og Heimstaður** | **Grundarlag fyri ávirkan** |
|---|---|
| Ognarfelag Tryggingartakaranna<br>Kongabrúgvin<br>Postboks 329<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag hjá TF Holding P/F, avleggur samtøkuroknskap. |
| TF Holding P/F<br>Kongabrúgvin<br>Postboks 329<br>FO-110 Tórshavn<br>Føroyar | Móðurfelag |

**Upplýsingar um nærstandandi partar**

Ognarfelag Tryggingartakaranna eigur 100% av partabrøvunum í TF Holding P/F.

TF Holding P/F eigur 100% av partabrøvunum í Betri Pensjón P/F og hevur tí avgerðandi ávirkan á felagið.

Aðrir nærstandandi partar hjá felagnum, eru nevndar- og stjórnarlimir í felagnum og atknýtt feløg, nevndar- og stjórnarlimir í hesum atknýttu feløgunum, umframt nærstandandi persónar hjá áður allýstu persónum.

Í farna árinum, fyriuttan vanliga leiðslusamsýning, eru ikki gjørdir aðrir handlar við nevnd, stjórn, leiðarar ellar aðrar nærstandandi partar enn tað, ið nevnt er niðanfyri.

Samsýning til nevnd og stjórn er víst í notu 8.

Kr. 1.000

| NOTA | | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|
| 14 | **Nærstandandi partar, framhald** | | |

**Handlar við nærstandandi partar**

Felagið keypur tænastur frá móðurfelagnum og systurfeløgum í samtakinum.

Umsitingargjøld til og frá tilknýttum fyritøkum í samtakinum, verða avroknað á útreiðslunøktandi støði. Húsaleiga til tilknýtta fyritøku verður avroknað eftir marknaðartreytum.

Avtala er gjørd millum feløgini í samtakinum um renting av leypandi millumverandi og er hendan renta ásett eftir marknaðartreytum. Í árinum eru renturnar av millumrokning við tilknýttar fyritøkur samlað -181 tkr. (-141 tkr. í 2010).

Innistandandi hjá systurfeløgum í samtakinum, verða renta eftir vanligum marknaðartreytum.

**Týðandi samhandil við tilknýttar fyritøkur**

| | 2011 | 2010 |
|---|---|---|
| Tænastu og umsitingargjald til tilknýttar fyritøkur | -2.360 | -2.914 |
| **Týðandi samhandil við tilknýttar fyritøkur í alt** | **-2.360** | **-2.914** |

15 **Viðkvæmisgreining av fíggjarognum**

| Hending | Minsta ávirkan á grundarfæfeingið í tkr. |
|---|---|
| Rentuhækking uppá 0,7 prosent stig | -5.466 |
| Rentulækking uppá 0,7 prosent stig | 4.827 |
| Partabrævalækking á 12 prosent | -1.881 |
| Ognarprísalækking á 8 prosent | - |
| Valutakursváði (VaR 99,5 prosent) | - |
| Tap uppá mótpartar | - |
| Lækking í deyðatali á 10 prosent | - |
| Hækking í deyðatali á 10 prosent | - |
| Hækking í óarbeiðstali á 10 prosent | - |

Felagið hevur ikki gjørt avtalu um nakrar samløgubonusskipanir, og tí hava omanfyri nevndu hendingar onga ávirkan á felagið í mun til bonusmøguleikar.

16 **Býti av samlaðum íløguognum á virkisøki og -stað**

| | Føroyar | Evropa annað | Norður Amerika | Suður Amerika | Japan | Fjareystur annað | Onnur lond | Ei sundur-greinað | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Orka | 0,0% | 1,9% | 4,4% | 0,0% | 0,6% | 0,0% | 0,5% | 0,0% | 7,5% |
| Atfeingi | 0,0% | 6,2% | 1,4% | 0,0% | 0,7% | 0,0% | 0,4% | 0,0% | 8,7% |
| Ídnaður | 0,0% | 9,7% | 1,5% | 0,0% | 2,3% | 0,0% | 2,1% | 0,0% | 15,6% |
| Nýstluvørur | 0,0% | 4,2% | 5,6% | 0,0% | 5,7% | 0,0% | 0,4% | 0,0% | 15,9% |
| Brúkaravørur | 0,0% | 4,4% | 4,6% | 0,0% | 1,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 10,0% |
| Heilsuviðgerð | 0,0% | 4,4% | 3,0% | 0,0% | 2,1% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 9,5% |
| Fígging | 0,0% | 6,2% | 3,1% | 0,0% | 3,8% | 0,0% | 1,6% | 0,0% | 14,8% |
| KT | 0,0% | 2,4% | 3,8% | 0,0% | 2,4% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 8,5% |
| Fjarsamskifti | 0,0% | 2,0% | 1,4% | 0,0% | 1,8% | 0,0% | 0,2% | 0,0% | 5,4% |
| Veiting | 0,0% | 0,5% | 1,8% | 0,0% | 0,4% | 0,0% | 0,6% | 0,0% | 3,3% |
| Ei sundurgreinað | 0,0% | 0,7% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,0% | 0,7% |
| **Í alt** | **0,0%** | **42,6%** | **30,7%** | **0,0%** | **20,8%** | **0,0%** | **5,9%** | **0,0%** | **100,0%** |



# LEIÐSLUÁTEKNING

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og viðtikið ársfrásøgnina fyri 2011 hjá Betri Pensjón P/F.

Ársfrásøgnin er greidd úr hondum í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi.

Vit meta, at nýttu roknskaparreglurnar eru hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum felagsins, fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2011, umframt av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar 2011 - 31. desember 2011.

**BETRI PENSJÓN P/F**
Tórshavn, hin 24. apríl 2012

**STJÓRN**

Mortan Poulsen, stjóri

**NEVND**

Regin Hammer, formaður

Heini Joensen

Herjolvur P. Jakobsen



# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARUM

## TIL KAPITALEIGARARNAR Í BETRI PENSJÓN P/F

### ÁTEKNING Á ÁRSFRÁSØGNINA

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá P/F Betri Pensjón fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2011 við leiðslufrágreiðing, leiðsluátekning, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn og notum. Ársfrásøgnin er gjørd eftir lóg um tryggingarvirksemi.

### ÁBYRGD LEIÐSLUNNAR AV ÁRSFRÁSØGNINI

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina ársfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til fyri at ársfrásøgnin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### ÁBYRGD GRANNSKOÐARANS

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársfrásøgnina. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og eftir øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársfrásøgnini.
Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðaraarbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin eisini innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til fyri at felagið kann gera eina ársfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og hvussu ársfrásøgnin sum heild er gjørd.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

### NIÐURSTØÐA

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu 31. desember 2011 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2011 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Tórshavn, hin 24.apríl 2012

SPEKT
**løggildir grannskoðarar SP/F**

*Finnbjørn Zachariasen*
*statsaut. revisor*

*Mirjam Haraldsen*
*statsaut. revisor*

Betri pensjón

Kongabrúgvin
Postboks 329
FO-110 Tórshavn
Tel 345600
www.betri.fo